# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

# Hanna Vang 60 ár



Í morgin, skírisdag 20. mars, fyllir Jóhanna Vang í Havn 60 ár. Hanna hevði í mong ár saman við manni sínum barnaklædnahandilin Dadduna í høvuðsstaðnum.

Foreldrini hjá Hannu eru Maja og Júst í Túni á Toftum. Tey fingu átta børn – fýra gentur og fýra dreingir – og Hanna er næstelst av gentunum. Hon varð fødd tríggjar dagar eftir, at mamman fylti tredivu ár.

Hanna gekk í preliminserskúla á Glyvrum, áðrenn hon fór til Havnar. Har arbeiddi hon í damudeildini í klædnahandlinum hjá Hans Joensen, og síðani gekk hon í handilsskúla og lærdi skrivstovuyrki hjá Føroya Vanlukkutrygging, har hon eisini arbeiddi eftir at vera avlærd.

Eftir at børnini vóru farin at koma, var Hanna heima í fleiri ár, og so var hon eitt skifti á skrivstovu í Tinganesi. Maðurin hevði havt matvøruhandil, men síðst í sjeyti árunum fóru tey bæði undir nýggjan handil. Fyrst seldu tey barnavognar og sengur og aðra útgerð, og síðani fóru tey í holtur við barnaklædnahandilin, sum tey nevndu Daddan. Tey vóru í handilshølunum aftanfyri Auto á Ingetrøð, har matvøruhandilin hjá Niels Vang hevði verið, eitt skifti vóru tey í SMS og so aftur á Ingetrøð. Seinastu mongu árini, sum tey høvdu handilin, vóru tey í hølunum uppi á Hálsi, har Daddan framvegis er.

Hanna hevur sera gott eygað fyri litum og samansetingum, hon er fryntlig, fyrikomandi og ógvuliga arbeiðssom og væl skipað, og handilin vaks seg stóran og var væl umtóktur. Fyri einum ári síðani góvust Hanna og maðurin at handla, og Daddan varð seld.

Sangur og tónleikur fyltu nógv í barnaheiminum á Toftum, og Hanna sang í mong ár í sangkórinum í Ebenezer. Hon og systurin Alma sungu miðskeiðis í seksti árunum inn á plátu hjá Hymnofon, og Eitt er landið hinumegin var mangan at hoyra í kvøðuljómunum og er tað framvegis av og á. Hannu dámar væl at vera í urtagarðinum, hon hevur altíð gingið til okkurt handverk í kvøldskúlanun, og Hannu og teimum dáma væl at ferðast.

Hanna giftist í 1970 við Jóhan Vang úr Havn. Tey bygdu í Stoffalág, har tey framvegis búgva í hugnaligum go snøggum heimi, sum altíð hevur verið eyðkent av stórum gestablídni.

Hanna og Jóhan eiga fimm børn: Niels, føddur í 1971, er giftur Miriam, sum er dóttur Jonnu og Hans Sivertsen í Nuuk. Tey búgva í Eysturgrønlandi, har tey eru trúboðarar. Júst, sum er føddur í 1973, arbeiðir hjá Statoil. Hann er giftur Katrini fødd Poulsen og ættað úr Vatnsoyrum. Eva, sum er fødd í 1977, er gift Jákupi Klein úr Vatnsoyrum. Tey búgva í Miðvági, og Eva er pedagog. Maria, sum er fødd í 1979, er gift Niels Paula Justinussen úr Leirvík. Maria er fysioterapeutur, og tey búgva í Havn. Rebekka, sum er fødd í 1987, býr heima hjá foreldrunum, og hon arbeiðir í frítíðarskúla. Hanna eigur átta ommubørn – tveir dreingir og seks gentur.

**J**

byin.fo

SKRÁ FYRI BYIN.FO Á PÁSKUM

**REX**
Frí 21. mars
90 ára kvøld við SNAP

Leyg 22. mars
Kim Hansen og Terji Rasmussen

Mán. 24. mars 2. páskadag
Spaðar 5 spæla til dans

**Eclipse**
Frí. 21. mars
Dj REX

Leyg. 22. mars
Dj REX

Mán. 24. mars 2. páskadag
Dj Eddy

**Cippo**
2. páskakvøld
SIC LIVE
16 ára aldursmark

**Manhattan**
2. páskadag
Uni D. og Tróndur Enni

2. páskadag er opið til kl. 04.00
á øllum støðum hjá byin.fo

